*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 2 | 2023 | pedagogfelag.fo

## Livandi námsfrøði í Brosinum, Mýrifípuni og Eikilund

## Metstór luttøka á aðalfundinum

## Vit hava uppiborið eina rættvísa løn

## Fríi viljin hevur tað gott á Miðstovninum

## Leiðararáðið fullmannað

## Sáttmálasetta fyrireikingartíðin munar onki

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent
www.foroyaprent.fo

Upplag
2.000 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Áhugabólkurin á ferð í Suðuroy

**7** Livandi námsfrøði í Brosinum, Mýrifípuni og Eikilund

**12** Tilgongdin hevur nógv at siga í verkætlanar-arbeiði

**13** Metstór luttøka á aðalfundinum

**19** Vit hava uppiborið eina rættvísa løn

**26** Vit mugu hava ráð og rúm at leiða

**29** Leiðararáðið fullmannað

**30** Fríi viljin hevur tað gott á Miðstovninum

**42** Súlan er góð

**44** Starvsaldur og lønartjekk

**45** Sáttmálasetta fyrireikingartíðin munar onki

**48** Námsfrøðingaráðið virkisført



ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# Fakið, starvið og menniskjuni

At arbeiða innan námsfrøðiliga starvsøkið gevur nógvar møguleikar. Tað er eisini eitt sera fjølbroytt og fjøltáttað starv.

Seinastu mánaðirnar hevur Fróðskaparsetrið við námsfrøðingaútbúgvingini og gransking verið eitt stórt evni.

Pedagogfelagið er umboðað í útbúgvingarráðnum fyri námsfrøðingaútbúgvingina og hevur í tí sambandinum havt møguleikan at verða hoyrt í sambandi við, at setrið nú skal taka fleiri námsfrøðislesandi inn. Eisini vóru vit við til at skipa eitt tiltak við Námsvísindadeildina á Setrinum, har vit, land og kommunur kundu koma við okkara hugsanum um týdningin av einari góðari útbúgving.

Somuleiðis havi eg sum formaður luttikið í einum námsvísindaligum granskingardegi á Námsvísindadeildini á Setrinum. Ein dagur, har víst var á, hvat fyri gransking er í gongd á námsfrøðiliga økinum í dag, og hvørjir tankar eru um gransking á økinum í framtíðini.

Vit kunnu skjótt staðfesta, at lítið er granskað í føroyskum námsfrøðiligum viðurskiftum, og at saknur er í tí, men samstundis kunnu vit fegnast um, at granskingin tó økist á økinum.

Eitt annað evni, ið fyllir nógv í hesum døgum, eru komandi samráðingar. Vit mugu tó bara staðfesta, at vit eru í einari bíðistøðu beint nú. Vit eru tolin – men, tað er avmarkað, hvussu leingi vit halda, at tað gevur meining at bíða. Onnur feløg eru í samráðingum í løtuni, eitt nú Lærarafelagið og Akademikarafelagið, hvørs sáttmálar fóru úr gildið í oktober í fjør, og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, hvørs sáttmáli fór úr gildið 1. januar í ár.

Vit sita tó ikki hendur í favn, meðan bíðað verður, og eru í gongd við at skipa onnur tiltøk, ið kunnu stuðla undir okkara virkisøki. Eitt nú er eitt átak um at seta orð á fakið í stoypiskeiðini.

Eisini er átakið “Skrivstovan á ferð”, eisini nevnt “Lønartjekk”, í gongd, har umsitingin í felagnum flytir skrivstovuna út um Havnina. Vit hava eitt nú verið í Klaksvík og í Sandavági. Ætlanin er, at vit eisini skulu til Suðuroynna, Sandoynna, Eysturoynna og Norðstreym, umframt at eitt kvøld verður sett av á skrivstovuni í Tungugøtu í Havn til tað sama. Kunnað verður so hvørt um, nær og hvar tiltøkini eru.

Lønartjekkið kemur í kjalavørrinum av, at fleiri uppliva at fáa skeiva løn, verða sett á skeivum lønarstigi, ella at yvirtíðargjald ikki verður roknað rætt. Í løtuni kunnu vit nevna, at endurgjaldskravið til Almannaverkið er komið upp um tvær milliónir, og tað kann væl vera, at fleiri eiga pening til góðar.

Føroya Pedagogfelag hevur eisini á fyrsta sinnið fingið umboðan í Javnstøðunevndini umboðandi løntakarar, og er tað eisini ein uppgáva, ið upp á ymiskar mátar nertir við okkara fakøki. Við tað, at 89 prosent av limum okkara eru kvinnur, hevur tað avgjørdan týdning, at tykkara rættindi eru góð og javnsett við onnur fakøki. Samstundis er tað ein avbjóðing innanhýsis á fakøkinum at økja um javnstøðuna við at fáa fleiri mannfólk inn í fakið at arbeiða.

Tilmælini frá Dagstovnaráðnum, og frá okkara felags kanning “Tíð til annað arbeiði” eru eisini á breddanum og eru gott grundarlag at byggja nakrar ítøkiligar ætlanir á. Tað er eitt av høvuðsevnunum, sum nevndin arbeiðir við nú við atliti at samráðingunum.

Í blaðnum kanst tú lesa meira um hesa kanningina og millum annað eisini um Miðstovnin í Havn og aktiva námsfrøðiliga arbeiðið har, um eykaaðalfundin hjá Leiðararáðnum, har kendur danskur ráðgevi og rithøvundur røddi um skommina, sum nógvir leiðarar ganga við, og um ferðina hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, sum nú var komin til Suðuroyar.

*Góðan lesihug og gott summar*



# Áhugabólkurin á ferð í Suðuroy

## Áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum

Í allar fagrasta veðri fóru vit vónríkar og hugagóðar til Suðuroyar mikudagin 19. apríl 2023. Vit ætlaðu okkum at vitja teir tríggjar dagstovnarnar, áðrenn limatiltak skuldi verða seinni um kvøldið í miðnámsskúlanum í Hovi.

Leiðin gekk fyrst til Tvøroyrar, har Kari Petersen vísti okkum runt á stovninum og greiddi okkum frá námsfrøðiligu arbeiðsgongdini og tonkunum aftan fyri teirra dagliga arbeiði.

Áhugavert var at hoyra, hvussu tey loysa avbjóðingarnar við millum annað plássgarantii, og hvussu arbeitt verður við at samantvinna nýggja og gamla bygningin og øll starvsfólkini, ið nú starvast í Mýrifípuni.

Um tað ber til, var veðrið enn betur, tá vit komu til Hvalbiar, og nærum øll børnini og starvsfólkini vóru farin uppá sveið. Tey tóku tó væl í móti okkum og Cjouanita Holm leiddi okkum hegnisliga gjøgnum stovnin og greiddi okkum eldhugað

frá teirra arbeiði og møguleikum, ið húsið og garðurin hava at bjóða.

Í Vági tók fuglafjarðarkvinnan, ið nú er Vágbingur, ímóti okkum. Anna Mari Erlingsdóttir Jacobsen hevði sett nýbakaðar vaflur og kaffi á borðið, og vit fingu eitt gott prát um námsfrøðiliga virksemið í Vági.

Mann kann siga, at hetta eru tríggir stovnar, sum hvør á sín hátt eru tilvitaðir um tað námsfrøðiliga arbeiðið, sum tey í løtuni eru upptikin av, og royna tey hvør á sín hátt at tillaga seg tær umstøður, tey virka undir. Á Tvøroyri og í Vági arbeiddu tey miðvíst við at skipa seg í mun til at veita plássgaranti, sum ger, at ætlanir skulu broytast og tillagast.

Samanumtikið er okkara fatan, at dagstovnaøkið í Suðuroy er í tryggum hondum, har starvsfólk og leiðsla hava eina greiða ætlan við sínum arbeiði. Fyrireiking og tíð til annað arbeiði er viðvirkandi til, at námsfrøðiliga arbeiðið verður útint á ein góðan hátt. Tað prógvar enn einaferð, hvussu umráðandi tað er, at námsfrøði verður hugsað sum eitt fak, ið eisini krevur tíð burtur frá kjarnuuppgávuni.

Fyri at børnini skulu fáa gagn av námsfrøðini krevst, at starvsfólkið fær stundir til at seta seg inn í, hvat tað einkulta barnið og barnafelagskapurin hevur tørv á, og at starvsfólkið fær tíð at hugsavna seg, fyrireika og eftirmeta námsfrøðiligu tiltøkini í gerandisdegnum.

Felags fyri dagstovnaøkið í Suðuroy er, at økið er útbygt til endamálið við nýggjum, stórum, rúmligum og ljósum stovnum/hølum. Bygningarnir liggja sum perlur í náttúruvøkrum øki, og starvsfólk og børn hava stóra gleði av náttúruni, bygdini og hentleikum í økinum.

## Í Hovi

Uttan góða móttøku og áhuga frá ymisku stovnunum kunnu vit ikki hava tiltøk. Vit høvdu ikki meira enn sent teldupost avstað til Suðuroyar, so høvdu teir tríggir stovnarnir játtað at hava framløgu. Kappingin var hørð at savna áhoyrarar hetta kvøldið. Bindiklubbakvøld var í Vági, Radio Salt á Tvøroyri, og sólin skein so fagurliga. Tó vóru tað fleiri, ið høvdu leitað sær til Hovs, og vit fingu eitt gott tiltak, har høvi eisini var at skifta orð um framløgurnar.

Námsfrøðingarnir høvdu góðar og gevandi framløgur, har teir greiddu okkum frá einum lítlum parti av teirra dagliga arbeiði og hugsanum aftanfyri tað, sum tey gera. Stovnarnir vístu til teirra námsætlanir og øll tey spennandi námsfrøðiligu hugtøkini, ið har liggja. Tað er ymiskt, hvussu arbeitt verður við námsfrøðiligu menningarøkjunum. Vit fingu høvi at hoyra, hvussu arbeitt verður við mennigarøkjum í longri tíðarskeið, og hvussu onnur hugsa menningarøkini inn í teirra vikuætlan. Hetta var við til at kveikja nakað hjá áhoyrarunum við dagstovnalógini sum grundarsteini undir øllum námsfrøðiligum arbeiði.

Samanumtikið kunnu vit enda við orðunum hjá Vygotskij: Vit mugu ikki gloyma, at grundleggjandi virðið í skapandi evnum barnsins ikki liggur í úrslitinum, í tí ítøkiliga, men í sjálvari tilgongdini. Tað, sum hevur týdning, er ikki, hvat ið tey skapa, men at tey skapa, at tey nýta sína skapandi megi í verki.



# LIVANDI NÁMSFRØÐI Í BROSINUM, MÝRIFÍPUNI OG EIKILUND

**Áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum er í síni ferð kring landið komin til Suðuroyar, og í apríl vórðu dagstovnarnir í oynni bodnir til limatiltak í Miðnámsskúlanum í Hovi, og fegnaðust starvsfólkini um møguleikan at hittast**

DAGFINN OLSEN

Mikukvøldið 19. apríl hevði áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum limatiltak í Miðnámsskúlanum í Hovi, og teir tríggir dagstovnarnir í oynni vóru bodnir at greiða frá sínum virksemi.

Edda Hjartvarsdóttir, forkvinna í áhugabólkinum, beyð øllum luttakandi vælkomnum, og segði eitt sindur um skránna og um bólkin, umframt um ferðina kring landið, sum nú var komin til Suðuroyar. Hon segði, at tey vanliga byrjaðu fundirnar við at syngja, og so tóku øll væl undir, tá “Meg minnist eina mynd” kom á skíggjan.

## Brosið – mentan og siðvenja

Á fundinum í Hovi sluppu dagstovnarnir í Suðuroynni at greiða frá nøkrum av tí, ið tey takast við í gerandisdegnum.

Dagstovnurin Brosið í Hvalba legði fyri.

Tey greiddu frá stovninum, ið er bygdur í 2017, og har 72 børn hava sína gongd. Talan er um barnagarð, vøggustovu, frítíðarskúla og skúlabólk.

Brosið legði í framløgu síni dent á evnini mentan og siðvenja, sum tey hava arbeitt við sum verkætlan í februar og mars.

Tey greiddu frá námsætlanini, og hvussu roynt verður at røkka teimum málunum, og um starvið, um gerandisdagin við fyrireiking, fundum, samstørvum, eftirmeting og øðrum, ið lagt verður upp til í námsætlanini. Víst varð eitt filmsbrot, har tey eru farin upp á gólv og kvøða, tí sangur og kvæði eru náttúrligur partur av tí, tey fáast við.

## Verkætlan

Í februar og mars 2023 hava tey arbeitt við verkætlan, ið hevði heitið “Fiskar og sjódjór í føroyskum sjógvi”.




Børnini valdu djór, ið tey høvdu áhuga í, tey gjørdu plakatir við teksti og mynd. Tey vóru túr á sandinum, har tey tóku ymiskt heim við, eisini burturkast, og tosað varð um tað, ið tey sóu.

Trolvirkið Bergið í Hvalba varð eisini vitjað, og har hittu tey millum annað ein kavara, ið fór í kavarabúna, og hann fekk nógvar spurningar.

Tey vitjaðu fiskavirkið TG Seafood í Hvalba, og fylgdu arbeiðsgongdini frá byrjan til enda, og tey vitjaðu eisini Varðan Pelagic á Tvøroyri. Síðani kom skapandi parturin við at klippa og líma og skapa eina framsýning, har dentur eisini varð lagdur á grønar loysnir við at endurnýta pappeskjur og annað.

Í Hvalba hava tey eftirmett, og meta, at talan sum heild var um sera væl eydnaða verkætlan, sum børnini framvegis tosa um og minnast.

## Hugurin ferðast til Italia

Síðani greiddu tey í barnagarðinum frá, tey sum hava 3 til 7 ára gomul børn, hvussu tey samstarvaðu og eisini løgdu dent á mentan og siðvenjur. Tey høvdu føroyska mentan á breddanum, har tey lærdu ymiskt um føroyakortið, tey høvdu mat- og bakidag, lærdu um tjaldrið í marsmánaði og høvdu um grind, ið eisini varð á matarlepanum.

Men stuttligasta løtan í framløguni var óivað, tá greitt varð frá, at tey eisini settu sjóneykuna á aðra mentan, og her valdu tey Italia.

Og nógv varð gjørt burtur úr! Til dømis vóru mentan, matur og málningalist á skránni, men børnini skuldu eisini "ferðast" til Italia.

Henda hugaferðin til Italia varð á fundinum í Hovi lýst í myndum, og børnini pakkaðu kuffert, fingu pass, og máttu við boardingkorti ígjøgnum trygdareftirlit, áðrenn tey sluppu á flog, og í Italia vitjaðu tey sandstrond, og gekk hetta fyri seg í sandkassanum á spæliplássinum uttanfyri Brosið.

Ikki sørt, at henda framløgan fekk brosini fram.

## Mýrifípan sjóðar saman

Síðan hevði dagstovnurin Mýrifípan á Tvøroyri orðið, og greiddu tey frá, at stovnurin hevur fleiri ár á baki, men hann er um- og útbygdur í 2020. Eini 40 fólk arbeiða á stovninum, har væl fleiri enn 100 børn hava sín gerandisdag. Sambært heimasíðuni hjá Tvøroyrar kommunu eru eini 123-134 tøk ansingarpláss, umframt 30 pláss í frítíðarskúlanum.

Av tí at alt er rættiliga nýtt og størri enn áður, verður støðugt arbeitt við at sameina stovnin. Nógv vaksin arbeiða á stovninum, og ein avbjóðing er at finna ein "reyðan tráð", so arbeitt ikki verður hvør í sínum lag.

Hetta verður eitt nú gjørt við at hava eina vikutalvu, ið millum annað hongur í gongini, har foreldur koma við børnunum, og har síggja tey, hvat arbeitt verður við, og er hetta í samsvari við menningarøkini í námsætlanini.

Talvan er gjørd soleiðis, at hon kann broytast, og kann hetta koma fyri, til dømis um veðrið broytist. Foreldur eru glað fyri vikuætlanina, har tey síggja, hvat børnini fást við.

Í Mýrifípuni meta tey, at eisini fyri



starvsfólkini eru nógvur fyrimunir við vikuætlanini, tí neyðugt er at hugsa seg um, og leggja til rættis, men tó skal ætlanin ikki stýra, men tíð skal hinvegin eisini vera fyri spæli og broytingum.

Sum heild eru øll glað fyri skipanina við vikuætlan, børn, starvsfólk og foreldur, og eftir loknan dag verður skrivað á, hvat er hent og hvussu hevur gingist.

## Eikilund – børn og ábyrgd

Anna Maria E. Jacobsen frá dagstovninum Eikilund í Vági fekk síðan orðið.

Eikilund hevur seks stovur; tvær vøggustovur og fýra barnagarðsstovur. Stovnurin er normeraður til 90 børn, 66 barnagarðsbørn og 24 vøggustovubørn. Nevnast kann, at í Vági er eisini Sóljan, sum heldur til í Vágs skúla, og er fyri børn, ið hava



eitt ár eftir í barnagarðinum, og har eru 20 pláss.

Annar Maria E. Jacobsen tosaði um evnið Børn og Ábyrgd. Hon nevndi ymisk dømi úr gerandisdegnum.

Eitt nú kom hon inn á, hvussu tey einaferð høvdu ein bólk av børnum, dreingjum, ið til dømis vóru málsliga veikir og ikki kundu vera saman. Ilt var at skapa sambond ella relatiónir.

Ymiskt varð roynt, til dømis við at arbeiða við ymiskum, ið teir høvdu áhuga í. Teir vóru túr úti í náttúruni, og heim komnir skuldu teir royna at seta orð á upplivingarnar. Foreldrini vóru við í gongdini, og tað gekk betri og betri.

Teir mentu orðatilfeingið og úthaldni og mentu persónlig virði og empati, og málsligi førleikin mentist, og var hetta nakað, sum fleiri teirra annars stríddust við. Realtiónarnar mentust, og hendi hetta gjøgnum spæl og upplivingar í náttúruni, har teir rørdu seg og mentu sansirnar.

Framstig vórðu gjørd, og foreldrini vóru ovfarin av tí, ið kom burturúr, greiddi Anna Maria millum annað frá, og legði afturat, at hon seinni hevur møtt nøkrum av hesum dreingjunum, ið enn fylgjast og eru vinmenn.

Hon greiddi frá, at tey í Eikilund arbeiða nógv við relatiónum og arbeiða nógv kreativt. Dentur verður til dømis lagdur á mentan, alt frá gomlu grindabátunum í Vági, til at halda flaggdag í Fámjin, og til at skapa, tá tey hoyra søgur, til dømis um søguligar persónar.

## Gull er í hvørjum barni

Edda Hjartvarsdóttir tók samanum, og takkaði luttakarunum, ið høvdu lagt fram.

Hon heitti síðan á fundarluttakararnar um at seta orð á, hví tey ynsktu at arbeiða á dagstovnaøkinum, og




eisini at seta orð á, hvat kann verða ella gerast betri.

Nógv boð vóru, tó mong vóru nokkso lík.

Mong søgdu seg verða glað at kenna, at tey gera mun:

- Stuttligt at síggja menning hjá børnum

- Fyrimunur, at ein sjálvur í stóran mun kann tilrættisleggja sín arbeiðsdag



- Umráðandi at hava tíð til at síggja gullið í hvørjum einstøkum barni

- Tá børnini spyrja eftir einum, kanska um náttina, so hevur ein óivað gjørt okkurt rætt

Millum dømini um, hvat luttakararnir ynsktu kundi gerast betri, vóru millum onnur hesi:

- Ynski um størri virðing fyri fakinum

- Betri og størri hølisumstøður

- Færri børn á stovninum og í hvørjari stovu

Endað varð við sanginum “Burtur á heiði”, og semja var millum fundarluttakararnar um, at tey vóru glað at sleppa at hittast, býta arbeiðsroyndir og hugskot, og at hoyra, hvussu onnur arbeiða.

# Tilgongdin hevur nógv at siga í verkætlanararbeiði

**Dagstovnurin Brosið í Hvalba arbeiðir ofta við verkætlanum, og meta tey hesa arbeiðsgongd lætta um samanborið við aðrar vanligar dagar**



DAGFINN OLSEN

Starvsfólkini í Brosinum í Hvalba greiddu á fundi í Hovi frá forvitnisligari verkætlan, har tey í februar og mars í ár høvdu arbeitt við fiskum og sjódjórum í føroyskum sjógvi.

Tað kann vera gevandi at hava verkætlan. Men hetta setir eisini spurningin, um so umfatandi verkætlan ikki er møðandi, og krevur nógv av starvsfólkunum?

– Teir dagarnir, ið ein hevur verkætlan, eru nógv lættari, og vit gera tað javnan. Tað, sum ger munin, er, at alt er lagt til rættis, og ein arbeiðir ikki frá degi til dags, fyri at siga tað soleiðis, siga starvsfólkini í Brosinum.

Tey siga, at tað stuttliga er eisini, at børnini vita av ætlanunum, og tey gleða seg, tey tíma, og hesa tíðina eru eisini munnandi minni av trupulleikum ella ósemjum.

Í Brosinum kunnu tey til dømis arbeiða soleiðis, at tey hava morgunfund, har børnini eru við til at leggja til rættis, og á henda hátt verður eisini arbeitt við onkrum, ið børnini hava hug til.

– Tá alt er lagt til rættis, so gongur arbeiðið lættari. Og ofta eru so nógv hugskot, so ein ein kann bara velja úr rúgvuni.

– Tá ein arbeiðir við verkætlan, so er tað tó ikki bert úrslitið, ið hevur týdning, men minst líka nógv er tað sjálv tilgongdin, eru tey samd um í Brosinum í Hvalba.



*Ongin sleppur inn á aðalfundin hjá Føroya Pedagogfelag uttan at verða skrásettur. Her skriva Haldis Ellendersen, námsfrøðingur, og Poula Eidesgaard, stovnsleiðari, seg inn*

# METSTÓR LUTTØKA Á AÐALFUNDINUM

**Hóast ongi val vóru á skrá, møttu umleið 550 limir upp á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag í ár. Ongantíð áður hevur luttøkan verið so stór**

INGOLF S. OLSEN – PRESS
MYNDIR: PAVLA ELIASEN – FOTOSTUDIO

Stórskíggjarnir í Veitsluhøllini á Hotel Føroyum komu væl og virðiliga til sín rætt á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag í ár, tí stóra høllin var á tremur við fólki. Aðalfundurin var 11. mars, og umleið 550 limir í Pedagogfelagnum vóru møttir. Tað er meira enn ein fjórðingur av limaskaranum og tað mesta nakrantíð á einum aðalfundi hjá felagnum.

Undan aðalfundinum hjá sjálvum felagnum hildu tey trý ráðini Námsfrøðingaráðið, Leiðararáðið og Hjálparfólkaráðið sínar regluligu aðalfundir.



*Hans Carli Jacobsen, pensjonistur og fyrrverandi tænastumannasettur námsfrøðingur, og Benny Andersen, formaður í danska Socialpædagogerne, í hugnaligum práti*

Vanliga møta nógv upp til aðalfund, tá dystarval er um formanssessin ella nevndarsessir, men onki val ella stórmál var á skrá á aðalfundinum í ár, so tað var ikki tað, ið dróg, og Jógvan Philbrow, formaður, var sjálvur ikki sørt ovfarin.

- Eg veit satt at siga ikki, hví áhugin í ár var so stórur, men sjálvt um ongi val vóru á skrá í ár, so er nógvur røringur rundan um okkara yrki í løtuni. Stóra starvsfólkatrotið á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum er jú av álvara komið fram í ljósið nú, og samgongan hevur sett




*Hjálparfólkaráðið er fullmannað, og ongin var upp á val á aðalfundinum. Úr vinstru eru tær Birgith Thomsen, Oda Dalfoss, Annelisa Davidsen, Hansine Brandt og Sunrid Vatnsdal, forkvinna*




*Jógvan Philbrow, formaður, til reiðar at bjóða vælkomin og seta hol á ein langan aðalfundardag*

bæði stytta arbeiðsviku og lønarlyft á skrá. Eg giti, at tað er ein orsøk til, at so nógv møttu, sigur hann.

## Smidligari uppstilling

Tvær lógarbroytingar vóru tó at taka støðu til. Onnur ger tað møguligt at skjóta upp og velja varalimir til felagsnevndina og tey trý ráðini á sjálvum aðalfundinum, um tað frammanundan eru ov fá valevni til, at varalimir eisini verða. Hin snúið seg um at staðfesta, at tíðin er farin frá kravinum um at lýsa aðalfundin í bløðunum, og at tað frameftir er nóg mikið at lýsa hann á heimasíðu felagsins.

Báðar broytingarnar vórðu samtyktar uttan nakað hóvasták.

Júst tað, at tað higartil, ikki hevur borið til at stilla valevni upp á sjálvum aðalfundinum hevur elvt til tvørleikar, serliga hjá ráðunum hjá Pedagogfelagnum, sum hava verið noydd at havt eykaaðalfundir fyri at gerast fullmannað.

Soleiðis var eisini í ár, tá bæði Námsfrøðingaráðið og Leiðararáðið ikki blivu fullmannað á regluliga aðalfundinum, tí lógarbroytingin fær ikki virknað fyrr enn á næsta aðalfundi.

Tey bæði ráðini hava síðan havt sínar eykaaðalfundir, sum lesast kann um í øðrum greinum her í blaðnum, men við lógarbroytingini er vónin, at tað frameftir slepst undan eykaaðalfundum bara fyri at manna ráðini.

Fleiri myndir eru á næstu síðunum.



*Prátið gekk dúgliga í steðginum ímillum aðalfundirnar hjá ráðunum og stóra aðalfundin hjá felagnum*



*Umleið 550 limir tóku lut í aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag á ár, tað er meira enn fjórði hvør limur og tað mesta nakrantíð*



*Stórskíggjarnir komu til sín rætt, tí øll høvdu ikki útsýni til røðarapallin*

*Ongin var upp á val til nevndina í Føroya Pedagogfelag í ár. Her er nevndin avmyndað í kavaveðrinum eftir aðalfundin. Úr vinstru eru tað Gunnvá Akraberg Hansen, nevndarlimur, Nikkil Heinesen, næstformaður, Jógvan Philbrow, formaður, Annika Østerø, skrivari, og Harald Joensen, nevndarlimur*





*Benny Andersen, formaður í danska Socialpædagogerne, sitandi fremst, og Nikkil Heinesen, næstformaður í Pedagogfelagnum, høvdu framløgur fyri teimum lesandi. Benny Andersen er javnan í Føroyum, tí hann hevur føroyska unnustu, og hann er nærum vorðin fastur fúsur á aðalfundunum hjá Føroya Pedagogfelag*



*Julianna Næs, eitt av undangongufólkunum í føroyska námsfrøðiyrkinum, í skemtiligum práti við felagsformannin Jógvan Philbrow*



*Námsfrøðingarnir Hildur Lisberg Jákupsdóttir, Dagny Miðskarð og Unn Jarnskorð Ellingsgaard fáa sær eitt kaffiprát.*




*Pedagogfelagið leggur hald á tað mesta av Hotel Føroyum, tá ársaðalfundur er. Tey trý ráðini hava eisini sínar regluligu aðalfundir áðrenn felagsaðalfundin, og tey lesandi hava sítt forum*



*Ongi persónsval vóru á skrá, og atkvøtt varð við hondsupprættan um tær báðar lógarbroytingarnar – ongin atkvøddi ímóti*



*Katrin Karlsdóttir, námsfrøðingur í Skúlanum á Fløtum í Havn, og Annika Østerø, leiðari á dagstovninum Lítlaskógi í Havn og nevndarlimur/skrivari í Pedagogfelagnum*



*Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrsmaður í barna- og útbúgvingarmálum, var gestarøðari*

### Jógvan Philbrow í síni røðu:

# Vit hava uppiborið eina rættvísa løn

**Røðan, sum Jógvan Philbrow, formaður, helt sum inngang til aðalfundin hjá Føroya Pedagogfelag, verður her endurgivin**

Góðu limir

Sum undanfarin ár, er tað skrivliga frágreiðingin frá nevndini, sambært fundarskránni, ið skal góðkennast. Frágreiðingina finna tit í seinasta pedagogblaðnum. Og lat meg bara siga sum er – vit hava havt avbjóðingar í at fáa blaðið út seinastu ferðirnar, tað er so mín ábyrgd at fáa í rættlag.

Føroya Pedagogfelag er eitt sterkt fakfelag, ið stríðist fyri korunum hjá okkum øllum innan námsfrøðiliga starvsøkið – tað veri seg leiðarar, námsfrøðingar ella hjálparfólk.

Vit umboða ein fjølbroyttan hóp. Tey, sum arbeiða við børnum, ungum, fólki við menningartarni, vaksnum, gomlum, og teimum, sum eru ein samanseting av øllum hesum.

Vit eru tey á gólvinum, sum útinna í gerandisdegnum, tey, sum skipa arbeiðið og tey, sum ráðgeva um arbeiðið.

Vit arbeiða við teimum útsettu, við teimum sjúku, teimum veikastu, og teimum, sum skulu bera okkum inn í framtíðina.

Vit arbeiða við at menna og læra, lurta og rúma, vegleiða, ráðgeva, og at geva menniskjanum rúm at vera til.

Vit eru límið, sum fær alt at hanga saman.

Vit hava uppiborið eina rættvísa løn fyri dygdargott arbeiði – lønin kemur ikki av ongum – hørð tøk skulu takast, stríðsstig, tvørheit, og ikki minst ein vilji at noyða broytingar ígjøgnum.

Vit hava havt nógv ymisk stríðsmál, har tykkara rættindi eru vunnin. Limir hava fingið endurgjald fyri manglandi setanarskriv. Limir hava fingið manglandi eftirløn goldna. Limir hava fingið rættan starvsaldur og eftirfylgjandi røttu løn, og limir hava fingið uppsagnarløn, tá



> SØGAN HEVUR ANNARS VÍST OKKUM, AT TEY SAMFELØG, SUM GERA ÍLØGUR Í VÆLFERÐ, HAVA RÁÐ TIL VÆLFERÐARTÆNASTUR, OG AT TAÐ GER SAMFELAGIÐ OG VINNUNA SERSTAKLIGA KAPPINGARFØR




> VIT ERU LÍMIÐ, SUM FÆR ALT AT HANGA SAMAN

arbeiðsgevarin hevur tvíhildið um, at eingin slíkur rættur var.

Og ikki minst hava vit vart rættin til yvirtíð – og kunnu vit upplýsa, at oman fyri ein millión krónur er ella er í fer við at verða útgoldin frá Almannaverkinum til limir, ið eru snýttir fyri yvirtíðargjaldið. Vit vænta, at upphæddin gerst uppaftur størri.

Vit eru á veg í samráðingar, vit bóðu í februar um fund, men eru arbeiðsgevararnar ikki til reiðar enn – og vænta vit nógv av okkara arbeiðsgevarum.

Har tey fyrr hava avnoktað starvsfólkatrotið, ásanna tey, at soleiðis er, og hava tey alment lovað okkum eitt lønarlyft.

Men hvat er tað, sum skal til, annað enn eitt lønarlyft?

– At umstøður, tíð og skipanir eiga at syrgja fyri, at til ber at útinna starvið.

*Tað leikar á á øllum mótum á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum, og í síni røðu kom Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, millum annað inn á sáttmálasamráðingarnar, sum eru fyri framman. Uttan at fara í smálutir við sáttmálakrøvum, nevndi hann eitt nú normeringarnar, sum ikki geva rúm fyri menniskjaligari nærveru, og arbeiðsætlanir, sum ikki verða lagdar við námsfrøðiliga tørvinum í huga. – Umstøður, tíð og skipanir eiga at syrgja fyri, at til ber at útinna starvið, legði hann dent á*

*Mynd: Pavla Eliasen*



> **UM VILJIN VAR AT SETA TRIVNAÐIN Í HÁSÆTI, SO VARÐ SETT INN. MEN HER VERÐUR IKKI SETT INN – HELDUR IKKI TÁ TALAN ER UM SO EINFØLD VIÐURSKIFTI SUM VIÐLÍKAHALD AV BYGNINGUM**

Normeringar? Ber til at møta menniskjunum, tú skalt varða av?

Alt ov ofta fái eg at vita, at tað ber ikki til. Uppgávan at vera saman við menniskjum, ið hava brúk fyri okkum, kann ikki røkjast fult út. Fleiri mugu sláa seg til tols við at bíða, útseta ella fáa eitt hálvt starvsfólk ella minni, tí aðrar uppgávur skulu loysast, meðan vit skulu loysa høvuðsuppgávuna.

Arbeiðsætlanir, sum ikki verða lagdar við námsfrøðiliga tørvinum í huga, eru eisini ein avbjóðing – alt ov ofta verða ætlanirnar lagdar við fígging fyrst og fremst í huganum. Tíð er ikki til yvirlapp/sparring. Fígging og menniskjatørvur ganga sjáldan hond í hond.

Partar av loysnunum á økinum eru ein uppraðfesting av eitt nú køksfólkum, húsavørðum og vaskifólkum. Uppgávur, ið hava lyndi at stjala tíð frá tykkum, sum skulu røkja námsfrøðiligu uppgávurnar.

Um viljin var at seta trivnaðin í hásæti, so varð sett inn. Men her verður ikki sett inn – heldur ikki tá talan er um so einføld viðurskifti sum viðlíkahald av bygningum.

Nú danska kjakið um at strika ein halgidag er í hásæti, fær tað meg at hugsa, hvussu tað ber til, at vit, íbúgvar í einum fólkaræði og vælferðarsamfelag, eru farin at loyva skipanum og rokniørkum at stýra samfelagnum, heldur enn fólkinum. Tí danska kjakið snýr seg um, at onkur hevur roknað seg fram til, at við at strika halgidagin fáa tey fleiri pengar í statskassan.

Um politikarar høvdu roknað uppá, hvørt tað var økonomiskt skilagott at menna eitt vælferðarsamfelag eftir seinna heimsbardaga, høvdu vit allarhelst ikki havt eitt vælferðarsamfelag.

Tá nýggjar skipanir skulu gerast ella setast á stovn, sum geva vanliga




menniskjanum betri sømdir, er mótstøðan ofta øgilig. Á næstan øllum frontum.

Um talan er um, at stytta arbeiðsvikuna, so er øgiligur ágangur eftir, at rokna seg fram til, at útreiðsluøkingin verður ógvuslig, og at tað fer at koppa kommunukassum, landskassanum og ikki minst, at vinnufyritøkur fara at hokna undan.

Høvdu vit gjørt kanningar og roknað okkum fram til, hvørt tað loysti seg fíggjarliga at hava eitt heilsuverk afturi í 1940´unum, giti eg, at útrokningarnar høvdu víst, at tað fór at kosta alt ov nógv í krónum at hava slíkar tænastur til øll. Og hví skulu tey frísku nú gjalda fyri, at fólk eru sjúk, gomul, óhjálpin?

Ella kann tað hugsast, at júst slíkar skipanir skapa tryggleika og javnvág í samfelagnum, soleiðis at vit øll fáa meira burturúr?

Tá politikarar nú loyva sær at koma við uppskotum, ið veruliga kunnu gera mun hjá vanliga fólkinum, at stytta arbeiðsvikuna ella at geva láglønarbólkum eitt lønarlyft, so

byrjar maskinaríið at prætika um, at tað verður ov dýrt, alt ov dýrt.

Ikki er loyvt at nevna ovurhonds-stóra vinningin, ið fleiri fyritøkur hava – partvíst vegna tað, at nógv er automatiserað. Ella at tey fáa atgongd til tilfeingi, sum onnur ikki fáa.

Men tað verður nú eisini dýrt ikki at hava arbeiðsfólk, tí tey eru farin aðrastaðni at arbeiða, tí lønarlag og arbeiðsviðurskifti eru ov vánalig. Tað verður eisini dýrt at lofta teim-

Nú skal eg ikki bara vera svart-skygdur.

Vit hava akkurát fingið eitt álit frá Dagstovnaráðnum – eitt álit, ið gevur kommunum og landið nøkur ítøkilig evni at arbeiða meira við, nortið verður við alt frá normeringum, arbeiðsumhvørvi og lønarlag, umframt møguleikarnar at fara undir útbúgving og eftirútbúgving.

Vit bíða eftir at fáa tilmælið frá kanningini um "tíð til annað arbeiði" (tað er síðan komið, sí aðra grein í

> **FRAMTÍÐIN TØRVAR OKKUM, OG FRAMTÍÐIN KREVUR HALDFØRAR LOYSNIR, IÐ BERT KUNNU FINNAST SAMAN VIÐ OKKUM**

um, sum vit ikki høvdu normeringar og arbeiðsumstøður til at lofta.

Søgan hevur annars víst okkum, at tey samfeløg, sum gera íløgur í vælferð, hava ráð til vælferðartænastur, og at tað ger samfelagið og vinnuna serstakliga kappingarfør.

Tað er ikki dýrkanin av elituni, ið tænir samfelagnum best!

Vit liva í einum av heimsins ríkastu londum. Sjálvandi hava vit eisini ráð til vælferð og at hjúkla um vanligu menniskjuni.

Rokniørkini fara púra vist at siga, at tað er ov dýrt at geva okkum eitt veruligt lønarlyft og gera upp við gomlu lønarskeivleikarnar í samfelagnum. Spurningurin verður tó, um politikararnir hava dirvi at standa við síni lyfti og gera átøk, ið kunnu vera við til at tryggja vælferðarsamfelagið, eisini í framtíðini.

blaðnum, red.), kanning, ið hevur verið gjørd saman við Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, ein kanning, sum púra vist eisini vísir á og kemur at geva nakrar ábendingar um, hvønn veg økið eigur at fara fyri at fleiri skulu ynskja at arbeiða her.

Heilt vist eru nógv ting broytt. Fleiri kommunur eru eisini farnar at játta fleiri pengar til fyrireiking og eftirmeting, størsta kommunan hevur broytt játtanarlykilin til tað betra – tíverri hava broytingarnar tó ikki havt nóg stóran virknað, og er enn langt á mál.

Orð verða eisini sett á starvsfólkatrotið, har tað fyrr hevur verið noktað og burturforklárað.

Á Fróðskaparsetrinum er mann eisini farin at hugsa nýtt og hugsa um, hvussu fleiri kunnu lokkast at velja sær eina námsfrøðingaútbúgving. Síðst í hesum mánaðinum

er eisini ætlanin at hava eitt tiltak á Setrinum, har fólk fáa møguleikan at kunna seg um útbúgvingina, og hvørjir møguleikar eru. Eisini í mun til at fáa góðskriva royndir og útbúgvingar, ið kunnu telja við, tá umsóknin skal viðgerast. Í dag hava umboð fyri námsfrøðishjálparaútbúgvingina í Hovi eisini  kunnað hjálparfólkum um úbúgvingina.

Alt í alt – ella, sum Djóni sigur so ofta "ikki tykkum at siga" – so sker nógv.

Eg eri bjartskygdur um framtíðina, fyri mær tykist tað, at virðingin fyri fakøkinum økist. Frá tí, at vit sum samfelag útfluttu tey við serligum tørvi, og dagstovnar vórðu mettir at vera av tí ónda, eru stovnar, bústovnar, sambýli, vøggustovur, barnagarðar, frítíðarskúlar, klubbar, vard verkstøð, stuðlar, eftirskúlatilboð og annað blivið ein sjálvfylgja.

Vit hava tó framvegis nakrar politikarar, ið eru av tí gamla slagnum, sum ikki hava skilt, at tað ikki longur snýr seg um at byggja stovnar, men eisini at tryggja, at verandi stovnar hava møguleika og umstøður at verða til.

"Onki um okkum, uttan okkum", var yvirskriftin á grein hjá Tóru Við Keldu í MEGD – og havi eg hug at siga tað sama.

Um eg skal seta orð á fleiri av broytingunum seinastu árini, haldi eg meg síggja eitt mynstur. Fleiri og fleiri avgerðir verða tiknar uttan um tey fólkini, ið starvast á økinum ella eru brúkarar av hesum tænastum.

Fyri ein stovnsleiðara merkir tað, at hansara rásarúm verður avmarkað, har leiðarin í minni og minni mun sleppur at hava seinasta orðið, tí avgerðin longu er tikin longri uppi í teimum meira sveimandi leiðsluløgunum.

Fyri námsfrøðingin og hjálparfólkið, sum skulu fáa gerandisdagin at hanga saman hjá børnum ella tí menniskjanum, sum hevur tørv á námsfrøðiligari tænastu, at megna dagin, merkir tað, at tey fáa minni og minni rásarúm at útinna arbeiðið og skulu arbeiða undir skipanum ella umstøðum, ið tey ikki hava ávirkan á.

So, mín áheitan á politisku og umsitingarligu skipanina er: Gevist við at taka avgerðir yvir høvdið á teimum, tað gongur út yvir, og teimum, ið arbeiða á økinum. Farið inn í eitt samskifti at vita, um nakrar felags loysnir skulu ella kunnu finnast.

Framtíðin tørvar okkum, og framtíðin krevur haldførar loysnir, ið bert kunnu finnast saman við okkum.

Avbjóðingarnar eru nógvar, men um vit verða tikin við, skal nokk bera til at loysa tær. Í felag megna vit meira, tí eru vit í felag.

Vónandi kunnu tit góðkenna frágreiðingina frá nevndini, sum er í blaðnum á síðu 4 til 8.

Og vónandi hava tit ein framhaldandi góðan aðalfund.

**Námsfrøðiligu leiðararnir:**

# VIT MUGU HAVA RÁÐ OG RÚM AT LEIÐA

**Leiðararnir á námsfrøðiligu arbeiðsplássunum vilja hava leiðsluuppgávuna í brennidepilin, tí hon er dottin niður ímillum í nógvu umrøðuni, sum annars hevur verið um námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðin. Tað kom fram á eyka-aðalfundi hjá Leiðararáðnum hjá Føroya Pedagogfelag. Danski leiðsluráðgevin og rithøvundurin Elsebeth Hauge var gestarøðari og røddi um evnið "leiðaraskomm", sum hon hevur skrivað bók um**

Leiðararnir sum fakbólkur og sjálv leiðsluuppgávan má nógv betur fram í ljósið, nú námsfrøðiligi arbeiðsmarknaðurin annars er á bredda-num. Tað halda tey í Leiðararáðnum hjá Føroya Pedagogfelag, sum hevur havt sín eykaaðalfund.

Leiðararáðið fýlist á, at leiðararnir og sjálv leiðsluuppgávan nærum ikki verða tikin upp á tungu í nógvu umrøðuni, sum er av truplu støðuni á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum.

Eitt nú sóknast tey eftir fleiri leiðsluamboðum at styrkja fakligheitina og fáa starvsfólk at trívast, og tey vísa á, at leiðararnir á teimum námsfrøðiligu arbeiðsplássunum hava ógvuliga fá amboð at leiða og motivera starvsfólk við.

Millum annað halda tey í ráðnum, at tað átti at verið møguligt hjá leiðaranum á einum námsfrøðiligum arbeiðsplássi at samsýnt starvsfólki fyri serligar førleikar og fyri at taka sær av serligum uppgávum. Eisini ger vantandi stabilitetur á starvsfólkaøkinum tað trupult at leiða, tí so nógv orka fer til at loysa bráfeingis uppgávur og finna avloysarar.

Í februar legði Dagstovnaráðið fram sítt tilmæli "Fyri barnsin besta", og á eykaaðalfundinum greiddu Julianna Næs og Edda Hjartvardsdóttir, sum umboða Føroya Pedagogfelag í Dagstovnaráðnum, frá álitinum.

Arbeiðið hjá Dagstovnaráðnum bleiv róst á eykaaðalfundinum, men eisini í tí sambandinum bleiv tó staðfest, at tilmælið ikki ger stórvegis burtur úr leiðarunum og leiðsluuppgávuni.




*Gestarøðarin Elisabeth Hauge hevur skrivað bók um leiðaraskomm og spurdi eisini námsfrøðiligu leiðararnar á eykaaðalfundinum um teirra skomm – millum annað um kensluna av ikki at røkka – og nógvu svarini blivu varpað upp á skíggjan*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*




*Tær báðar Julianna Næs og Edda Hjartvardsdóttir greiddu væl frá arbeiðnum í Dagstovnaráðnum og tilmælinum"Fyri barnsins besta", sum ráðið greiddi úr hondum í februar*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



*Eykaaðalfundurin hjá Leiðararáðnum varð hildin í Smæruni í Havn 3. mai*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

## Leiðaraskomm

Á eykaaðalfundinum, sum var hildin í Smæruni í Havn, var danski leiðsluráðgevin og rithøvundurin Elsebeth Hauge gestarøðari. Evnið var "leiðaraskomm", sum hon við støði í samrøðum við nógvar leiðarar á privatum og almennum arbeiðsplássum eisini hevur skrivað bók um.

Hennara kanningar staðfesta, at nógvir leiðarar ganga runt og skammast. Teir skammast um alt møguligt í sambandi við arbeiðið, og afturvendandi er skommin av ikki at røkka í gerandisdegnum.

Elsebeth Hauge bað eisini námsfrøðiligu leiðararnar í Smæruni koma við dømum, har teir skammaðust, eitt nú í støðum, tá teir ikki kendu seg røkka, og svarini trutu ikki.



*Danski leiðsluráðgevin og rithøvundurin Elsebeth Hauge var gestarøðari*



*Nýggja Leiðararáðið hjá Føroya Pedagogfelag. Úr vinstru eru tað Eyð Skúvadal Johannesen, Arna Silvurstein, Diana S. Mouritsen, eykaumboð, Elisasbeth Henriksen, Mirjam Johannesen og Turið Horn*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Leiðararáðið fullmannað

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað eydnaðist bæði at fáa valt teir báðar ráðslimirnar, sum restaðu í, og eitt eykaumboð, á eykaaðalfundinum hjá Leiðararáðnum, sum varð hildin í Smæruni í Havn 3. mai.

Nýggju ráðslimirnir eru Arna Silvurstein og Eyð Skúvadal Johannesen, og Diana S. Mouritsen bleiv vald sum eykaumboð. Hinir ráðslimirnir eru Mirjam Johannesen, forkvinna, Elisabeth Henriksen og Turið Horn.

Nýggja ráðið hevur tó ikki skipað seg enn.

Neyðugt var við eykaaðalfundi, eftir at tey bæði Joan Midjord og Hans Andrias Olsen undan regluliga aðalfundinum høvdu boðað frá, at tey ikki ætlaðu at halda fram í ráðnum. Lógirnar hjá Pedagogfelagnum loyvdu ikki, at nýggj umboð kundu stillast upp og veljast á sjálvum aðalfundinum 11. mars, men tá bleiv ein lógarbroyting tó samtykt, sum ger, at hetta fer at bera til frameftir.

# FRÍI VILJIN HEVUR TAÐ GOTT Á MIÐSTOVNINUM

**Hóast tilveran hevur verið umskiftandi og ofta rokalig seinastu fimm árini, heldur Miðstovnurin í Havn opnu námsfrøðiligu kósina, har forvitnið og hugurin hjá børnunum sjálvum sleppa at stýra, hvørjir sansir skulu mennast og stimbrast og hvussu**

ORÐ OG MYNDIR:
INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Vit hava havt 15 innkoyringar við nýggjum børnum í tveir mánaðir, so næstan øll orkan fer til at skapa relasjónir. Tá er tað gott at kunna byggja á eina holla fakliga vitan, sum ger, at vit eisini fáa stýrt og virkað undir trýsti.

Elsa Henrysdóttir av Reyni hevur nógv um oyruni sum leiðari á dagstovninum Miðstovninum í Havn, og tað hava øll hini starvsfólkini eisini.

Tað er onki nýtt í tí, tí síðan Miðstovnurin mátti flyta úr Gundadali fyri fimm árum síðan, hevur tilveran verið rokalig bæði so og so, og fysisku karmarnir eru støðugt broyttir.

Elsa hevur starvast í Miðstovninum síðan august 2019 og tey seinastu tvey árini sum leiðari.

– Vit hava roynt at verið øll í einum húsi, ein rúgva av børnum frá vøggustovu til barnagarð, øll í Gamla Realskúlanum. Seinni blivu barnagarðsbørnini flutt fyri seg yvir í Finsen, men tey skuldu ganga yvir í Frøken Cohr í øllum veðri, summar, vetur, heyst og vár, at eta matpakkan, tí tað vóru tað ikki umstøður til í Finsen, har okkara fysisku karmar vóru ein long kjallaragongd við einum einstøkum rúmi, sum bleiv brúkt til tað kreativa.

– Og so var tað hetta við ikki at vita, um vit fingu ein bygning ella ikki, til tað bleiv til tað, at vit fingu Kongagøtu. Og í øllum hesum hava vit so skula bygt upp eina rutinu og eina námsætlan, tað hevur ikki verið so einfalt, sigur hon og flennir við, tá

## Miðstovnurin

60 børn eru í løtuni innskrivað í barnagarðin í Miðstovninum. Tey kunnu vera 65 har, og garderobupláss er til 74. Vøggustovan er normerað til 29 børn. Tilsamans eru 23 ársverk í stovninum.

*Elsa Henrysdóttir av Reyni tók við sum leiðari í Miðstovninum í august í 2021. - Eg vildi royna, tí eg brenni fyri hesum pedagogikkinum, sigur hon*



hon hugsar bara fáar mánaðir aftur í tíðina.

Tað var ikki fyrr enn í september í fjør, at hølisviðurskiftini komu nøkulunda upp á pláss, tá barnagarðurin loksins slapp í stóra gula bygningin í Kongagøtu, har frítíðarskúlin var fyrr.

## Kósin verður hildin

At tað var rokaligt henda dagin, Pedagogblaðið var og vitjaði, hevði minni at siga, tí sum Elsa  staðfesti, so er grundstøðið, tann rótfesta fakliga vitanin, í lagi, og tá liggur tann námsfrøðiligi parturin ikki eftir.

Í øllum rokanum hesi seinastu fimm árini hevur tað eisini júst verið eitt eyðkenni fyri Miðstovnin, at tey allatíðina hava megnað at hildið fast í tí opnu námsfrøðiligu kósini – og gera tað enn.

Í so máta hevur stovnurin so mikið gott kjølfesti í sínum námsfrøðiligu hugsjónum og áskoðanum, at lógvatakið ímillum spæl og læring, og tað at lata forvitnið og fría viljan hjá barninum vera stýrandi í sansastimbran og menning í einum opnum stovnsumhvørvi er íborið. Tað liggur í dna'num hjá Miðstovninum.

## Fótaðu sær

Heldur ikki tá tað fyri tveimum árum síðan breyt so ógvusliga í bæði borð, at táverandi stovnsleiðarin Asta í Toft gjørdi av at siga upp, var víkt frá námsfrøðiliga stavnhaldinum.

– Vit vistu fullvæl, at umstøðurnar hjá okkum ikki vóru í lagi, fysisku karmarnir vóru ikki í lagi, hvørki inni ella úti, og vit manglaðu námsfrøðingar. Men tað vóru hvørki vit starvsfólk ella námsfrøðin, sum lá í stríð við foreldrini ella kommununa. Vit kendu okkum heldur als ikki aftur í tí, sum var ført fram í miðlunum.

– So tá táverandi leiðarin hevði sagt upp, bleiv tað "damage control" – tað ráddi um at fóta sær aftur. Elin, sum varaleiðari, tók yvir. Hon dugir bara hatta har og hevur ein náttúrligan myndugleika, so hon setti beinanvegin fótin niður og gjørdi greitt, hvat hon fór at broyta, og hvat hon ikki fór at gera.

– Tað bleiv sjálvandi nógv samskifti við foreldur og sovorðið, men tað gekk skjótt, so høvdu vit stabiliserað okkum, og foreldrini kendu seg trygg aftur, greiðir Elsa frá.

## Brennur fyri námsfrøðini

Elin N. W. Tausen, varaleiðarin, hevði tó ikki hug at søkja leiðarastarvið, tá tað skuldi lýsast leyst, og tí sókti Elsa starvið og fekk tað. Hon tók við sum leiðari í august í 2021.



– Eg vildi royna, tí eg brenni fyri hesum pedagogikkinum, sigur hon.

Óvissan, serliga um hølisviðurskiftini, hevur verið ein trúgvur fylgisveinur hjá Miðstovninum, síðan hann flutti inn í miðbýin.

– Vit royna at halda eina greiða námsfrøðiliga kós, men vanliga verður sagt, at tað tekur 10 ár at byggja ein tradisjonellan dagstovn upp. Men vit eru ikki ein tradisjonellur stovnur, og sjálvt um navnið á stovninum er gamalt í Tórshavnar Kommunu, so er Miðstovnurin bara fimm ára gamal, her sum vit eru nú. Og hølisviðurskiftini hava verið buldrut og umskiftandi, so tað hava verið ringar umstøður at byggja upp praktiskar rutinur, teir námsfrøðiligu karmarnar og gera námsætlan.



*Kaja Hansen hevur verið hjálparfólk í Miðstovninum í sjey ár og lesur nú á triðja ári námsfrøði á Fróðskaparsetrinum, samstundis sum hon framvegis arbeiðir hálva tíð sum hjálparfólk. Turbulensurin á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum hevur ikki fingið hana at umhugsa aðra lívsleið. - Nei, eg tími onki annað, og tað er hetta, eg ætli mær, sigur hon avgjørd*

– Jú, vit hava gaman í skrivað eina námsætlan. Vit vita væl, hvat vit skulu, men tað má skipast nógv betur, og ávísar broytingar skulu til. Men tað er ringt at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind, tá vit stríðast við starvsfólkatrot, hølisviðurskiftini ikki eru gjørd til endamálið, onki spælipláss er uttanfyri, og vit hvønn mánað hava nógvar innkoyringar. Men vit vilja hetta og royna at fáa alt at rigga so væl, sum tað nú einaferð er gjørligt, sigur Elsa.

## Stabil støða

Starvsfólkastøðan í Miðstovninum er vorðin rættiliga stabil nú, tá tað snýr seg um tann fasta starvsfólkahópin.



*Gamli Realskúlin var fyrsti bygningurin, sum Miðstovnurin flutti inn í á nýggju staðsetingini, og her húsast vøggustovan enn*



*Elin N. W. Tausen, varaleiðari, hevur ábyrgdina av kreativa verkstaðnum, og hon situr púra rólig og hyggur at, meðan børnini líma við límpistól, sum kann gerast brennandi heit. - Nerta tey tútin, so merkja tey beinanvegin, hvussu heitur hann er, og rykkja fingrarnar burtur. Soleiðis læra tey at ansa eftir og læra samstundis at brúka tólið, greiðir hon frá*

– Vit hava ein rættiliga tryggan kjarnuhóp. Vit klára ikki upp á tveir triðingar námsfrøðingar, sum lógin sigur, men býtið er umleið helvt um helvt námsfrøðingar og hjálparfólk, og tað er betri enn á nógvum øðrum dagstovnum.

– Tvey av okkara hjálparfólkum fóru at lesa til námsfrøðing í senn, men vit hava ikki mist tey heilt, tí annað teirra arbeiðir fast hálva tíð í vøggustovuni við síðuna av lesnaðinum og hitt avloysir. Tilsamans hava vit tvey sum lesa og samstundis arbeiða fast hálva tíð, og tað er ordiliga gott, tá tað verður sett við upp á handa mátan, sigur Elsa Henrysdóttir av Reyni.

## Kaja er trúføst

Ein av teimum, ið soleiðis verður sett við er Kaja Hansen. Tað er hon, ið arbeiðir hálva tíð í vøggustovuni meðan hon lesur til námsfrøðing, og hon er nú um at vera liðug við sítt triðja lestrarár.

Hóast ung av aldri er hon tann, sum hevur arbeitt longst í vøggustovuni í Miðstovninum. Hon byrjaði sum hjálparfólk í barnagarðinum í 2016, tá hann enn húsaðist í gomlu barakkunum í Gundadali. Tá stovnurin fekk vøggustovu í Hornabø í 2017, var hon ein av trimum, sum fóru úr Gundadali og út í Hornabø, og hon hevur arbeitt í vøggustovuni síðan.

Í 2020 byrjaði hon at lesa til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum, men við síðuna av lestrinum megnar hon at arbeiða hálva tíð sum hjálparfólk.

Eisini Kaja er hugtikin av mátanum at arbeiða upp á í Miðstovninum, og tó at tað hevur verið budrasligt har til tíðir, og nógvur turbulensur eisini hevur verið á tí námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum sum heild, so hevur tað ikki fingið hana at umhugsa aðra lívsleið.

– Nei, eg tími onki annað, og tað er hetta, eg ætli mær, sigur hon avgjørd.

## Trot á avloysarum

Heldur ikki Miðstovnurin sleppur tó undan at merkja, at tað er trot á



*Enn eru snøklar at fáa upp á pláss, áðrenn Miðstovnurin fær fulla gleði av snotiliga bygninginum í Kongagøtu, sum barnagarðurin flutti inn í í oktober í fjør. Elsa Henrysdóttir av Reyni, stovnsleiðari, ynskir sær ein millum bygning, so at tað ber til at ferðast ímillum bygningarnar uttan at skula út í øllum veðri*

bæði útbúnum námsfrøðingum og hjálparfólkum í Føroyum, tí sjálvt um tey hava nakrar fastar avloysar-ar at heita á, so er tað ein trupulleiki at fáa nóg mikið av avloysarum, tá á stendur.

– Eg mangli ikki starvsfólk í tí fasta hópinum, tí størvini eru øll sett, men stovnurin er stórur og samlaða tímatalið svarar til umleið 25 ársverk. Við so nógvum starvsfólkum er tað næstan altíð onkur, sum ikki fær møtt, og um til dømis nógv sjúkufráfall er í senn, so stendur av álvara á at fáa nóg mikið av avloysarum.

– Men har er so ongin pardón, havi eg ov lítið av starvsfólki til arbeiðis, so skerja vit virksemið og lata aftur fyri onkrum aktivitetum, sigur Elsa.

Tann dagin, Pedagogblaðið var og vitjaði, var júst ein slíkur dagur við nógvum sjúkrameldingum, og tí varð gjørt av at steingja vøggustovuna klokkan 14.

## Opin stovnur

Miðstovnurin spjaldrar seg sjálvur sum ein opin stovnur við tað, at børnini sum heild sjálv sleppa at velja sínar aktivitetir – um tey vilja vera úti og granska náttúruna og fyribrigdi har, ella tey vilja brúka síni evni á kreativa verkstaðnum, spæla í spælirúminum ella rokast í byggi- og rørslurúminum fyri bara at nevna nakrar av nógvu møguleikunum.

Meðan dagstovnar av tí tradisjonella slagnum eru býttir upp í stovur, sum børnini hoyra til, og sum hvør hevur sínar námsfrøðingar og hjálparfólk, so er ein opin stovnur, sum Miðstovnurin er, býttur upp í øki ella verkstovur, ið hvør sær kunnu hava fleiri funksjónir. Børnini kunnu so frítt reika ímillum verkstovur og funksjónir og velja til og frá.

Námsfrøðingar og hjálparfólk hoyra so til ávís øki, og børnini vita, at til júst hatta økið við hasum funksjónunum hoyrir hasin ella hasin námsfrøðingurin.

– Vit leggja stóran dent á at lata tað fría barnið sjálvt velja út frá egnum áhuga og læra ígjøgnum spæl.

– Tó halda vit sjálvandi eyga við, at alt gongur rætt fyri seg. Tað fer altíð

# Reggio Emilia-námsfrøðin



**LORIS MALAGUZZI,** ið livdi frá 1920 til 1994, var ein italskur námsfrøðingur við hollari sálarfrøðiligari vitan, sum eftir Seinna Heimskríggj varð settur á odda fyri rakstrinum og menningini av teimum kommunalu barnagørðunum í italsku kommununi Reggio Emilia.

Hansara námsfrøðiliga filosofi – hugsjónir, hugsanir og áskoðanir – er síðan vorðið kallað Reggio Emilia-námsfrøðin.

Hjartatátturin í Reggio Emilia-námsfrøðini er tey 100 málini, sum Loris Malaguzzi myndaliga kallaði teir óteljandi mátarnar hjá børnum at samskifta í orðum, myndum, tekningum, rørslum, sjónleiki og so framvegis.

Hann uppfataði dagstovnin sum eitt alment rúm ella ein pall, har hetta almenna samskiftið hjá børnunum fór fram, gav teimum vitan og var grundin undir allari teirra menning. Leikluturin hjá námsfrøðingunum er at vegleiða og stimbra børnini í hesi gongdini og í minst møguligan mun avmarka tey.

Verkstovu- og funksjónsuppbýtið hevur ein týðandi leiklut í Reggio Emilia-námsfrøðini, tí tað fysiska námsfrøðiliga umhvørvið – tað almenna rúmið – er at rokna sum ein eyka námsfrøðingur.

at vera okkurt, sum børnini skulu gera, og har tað eru vit vaksnu sum stýra. Tað megna børnini væl, tá tey vita, at alt hitt er til staðar, og tey hava eitt val, sigur Elsa.

## Reggio Emilia

Leisturin er í stóran mun Reggio Emilia-námsfrøðin hjá italska námsfrøðinginum Loris Malaguzzi, sála – gaman í kryddað við ymiskum øðrum námsfrøðiligum hugsanum eisini, millum annað hugsanunum hjá týska Frøbel – og tað ber til, sjálvt um ongin av teimum núverandi námsfrøðingunum á Miðstovninum er útbúgvin Reggio Emilia-námsfrøðingur.

Námsfrøðin í Miðstovninum er bygd upp ígjøgnum nógv ár av einari røð av námsfrøðiligum eldsálum, og onkur teirra hevur eisini nomið sær servitan í Reggio Emilia-námsfrøðini.

– Vit, sum eru komin til seinni, eru komin, tí vit eru áhugað í hesum opna og fría mátanum at arbeiða uppá. Sjálv havi eg eisini av mínum eintingum lisið eina rúgvu um Reggio Emilia-námsfrøðina og aðrar áskoðanir um opnan stovnsbygnað við verkstovum ella funksjónum heldur enn føstum stovum.

– Tað ber tó als ikki til, soleiðis bara uttan nakað, at kopiera Reggio Emilia. Tú kanst brúka filosofiina ella áskoðanina, men so mást tú byggja tað upp og laga tað til tíni viðurskifti, í okkara føri føroysk viðurskifti. Og aðrar áskoðanir enn Reggio Emilia eru sum sagt eisini ímillum okkara námsfrøðiligu byggisteinar, greiðir Elsa frá.

## Læra av mistøkum

Tað ræður um at lata barnið sjálvt taka avgerðir og royna seg – og ikki



*Gunn Maritudóttir, námsfrøðingur í vøggustovuni hjá Miðstovninum, dámar væl námsfrøðiliga arbeiðsháttin á stovninum*

minst læra av skeivum avgerðum og gerðum.

Varaleiðarin Elin N. W. Tausen hevur eisini ábyrgdina av kreativa verkstaðnum, og tá Pedagogblaðið vitjaði, vóru børnini rundan um hana og límaðu ymiskt við límpistól. Túturin, har límið kemur úr, verður brennandi heitur, tá pistólin verður brúkt, og onkur hevði kanska hvept seg við at latið sítt barn brúkt hetta amboðið.

Men Elin situr rólig og hyggur at, meðan børnini líma.

– Nerta tey tútin, so merkja tey beinanvegin, hvussu heitur hann er, og rykkja fingrarnar burtur. Soleiðis læra tey at ansa eftir og læra samstundis at brúka tólið, greiðir hon frá.

Sum regul er gravgangur eftir at sleppa inn á kreativa verkstaðið til Elin og Sáru Henriksen, námsfrøðing, sum eisini hevur sítt pláss har.

– Tað hava verið upp í eini 25 børn her í senn, so tá er futtur í, sigur Elin.

## Útillív

At Miðstovnurin liggur mitt í býnum beint við Steinatún og ókeypis bussarnar har, kemur væl við. Ikki minst hjá børnunum, sum dáma at vera úti og hjá útinámsfrøðinginum Almu á Lava. Hon hevur ábyrgdina av útilívinum, og tað kann onkuntíð vera eitt sindur avbjóðandi, tí Miðstovnurin hevur onki ordiligt spælipláss.

Men tað er lagamanni at fara ein túr til gongu at læra staðarnøvnini í Havn, ella tey taka bussin.

– Tað er gott, at børnini kunnu læra býin og fólkini at kenna. Tey læra, hvussu støðini eita, og tey læra at siga hey og heilsa upp á fólk. Soleiðis læra tey at uppføra seg pent, og tey finna út av, at tey ikki eru einsamøll. Tað eru ikki so nógvir dagstovnar, sum hava so góðar møguleikar til hetta sum vit, sigur Alma á Lava.





*Starvsfólkahópurin í vøggustovuni í Miðstovninum tann dagin, tá Pedagogblaðið vitjaði. Úr vinstru eru tað Lis Djurhuus Poulsen, námsfrøðingur, Petra Christiansen, hjálparfólk, Yvonna Hjaltalin, námsfrøðingur, Óluva Nolsøe Joensen, hjálparfólk, Gunn Maritudóttir, námsfrøðingur, Sandra Brimsvík, hjálparfólk, og Kaja Hansen, hjálparfólk*

Hon fer eisini longri túrar við børnunum, út í lendið og náttúruna, har børnini sjálv sleppa at vera forvitin og granska.

– Tey finna út av, at náttúran ikki er farlig, um tey hava virðing fyri henni og eru góð við hana, greiðir Alma frá.

Men eisini hon merkir starvsfólkatrotið av og á, tá tað ikki ber til at finna avloysarar.

– Tað kann til dømis vera ein trupulleiki, tá eg standi við einum snigli ella maðki, sum eitt barn ordiliga fegin vil hugsavna seg um, og so rópa tvey onnur eftir mær um okkurt, sigur Alma.

## Sólskinssøga

Alma elskar sítt arbeiði og opnu námsfrøðina í Miðstovninum, og hon veit eisini fleiri sólskinssøgur at siga um júst hetta.

– Vit hava fingið børn inn her, sum hava gingið aðrastaðni, har tey als ikki trivust, men sum eru farin at stórtrívast, tá tey koma her og sjálv sleppa at velja.

– Vit eru øll ymisk sum menniskju, eisini børnini, og tey kunnu eisini broyta áhuga og vanar. Summi hava kanska bara havt hug at sitið inni og tekna og klippa og líma, og tað er eisini fínt, men so broytist tað, og tey vilja knappliga bara vera úti.

– Tað er eisini í lagi, at eitt barn heldur í blusuni ella jakkanum hjá einum vaksnum allan dagin, um tað er tað, sum barnið hevur tørv á júst tá.

– Keðir eitt barn seg, so finnur tað upp á, um tað sleppur at brúka sín



fría vilja. Tað er so týðuligt, tá eitt barn ikki mennist, tí tað verður noytt at verða í onkrum, sum tað als ikki hevur hug til. Um tú fært sjóverk av at bólta rút, so mást tú hava møguleika at gera okkurt annað – og so kanst tú kanska menna teg við øðrum aktivitetum, alt meðan tú spakuliga við tíðini eisini fert at megna at bólta rút, sigur Alma.

## Barnið aftanfyri

Miðstovnurin vil fevna øll børn, og tað merkir millum annað, at børn við serligum tørvi fegin sleppa á stovnin. Tey verða innskrivað og móttikin sum øll onnur og rúmast væl í opna stovnsbygnaðinum.

– Sjálvandi vita vit, at tey hava hesar og hasar avbjóðingarnar, og halda vit, at tørvur er á einum meiri sernámsfrøðiligum tilboði til ávís børn, so siga vit frá og viðmæla tað. Tað skal altíð vera tørvurin hjá barninum, sum kemur fyrst. Og í hesum tíðum er tað sera trupult at fáa starvsfólk til børn, ið hava avbjóðingar, og summi børn krevja ein til ein, og tað ber sera illa til at finna starvsfólk til tað – ikki bara í okkara dagstovni, men allastaðni.

– Men vit leggja eisini dent á, at eisini børn við serligum tørvi koma her til eitt námsfrøðiligt tilboð – at ganga í vøggustovu ella í barnagarð – og tí er tað barnið, tað lítla menniskjað aftanfyri diagnosuna og atferðina, vit hava fokus á, greiðir Elsa Henrysdóttir av Reyni, stovnsleiðari, frá.

## Nógv tungumál

Miðstovnurin merkir eisini ta sannroynd, at Føroyar verða alsamt meira fjølmentaðar í fólkasamansetingini.

– Vit hava børn frá átta-níggju ymiskum nasjonalitetum, og í starvsfólkahópinum eru trý fólk av útlendskum uppruna. Ein tosar flótandi føroyskt, men hini duga ikki. Men tað gongur fínt, tí børn samskifta jú við hundrað málum, sum Loris Malaguzzi segði, og tey veipa ella hála í teg, um tú ikki skilir, hvat tey siga.

– Og mangan er tað stuttligt, ein dagin lat í einum barni “tú, handan

konan, sum ikki dugir at snakka føroyskt, hon dugir øgiliga væl at baka bollar", greiðir Elsa flennandi frá.

## Málmenning

Tó at fremmandamál ikki er nakar trupulleiki, so verður stórur dentur lagdur á málmenningina í Miðstovninum, og tá tosa vit um føroyskt mál.

– Vit síggja og hoyra væl, at børn í dag eru ógvuliga ávirkað av fartelefonum, I-paddum, og hvat alt eitur. Summi tosa tað, vit kalla Youtubemál. Vit ganga ikki og rætta tey, men tá tey til dømis siga okkurt á enskum, so taka vit tað uppaftur á føroyskum, og kanska vit siga "jamen tú sigur tað á enskum, á føroyskum eitur tað so og so".

– Og vit brúka bert skíggjar, um tað er í sambandi við okkurt námsfrøðiligt tiltak, til dømis at vísa ymisk djór, lurta eftir serligum ljóðum, hyggja at onkrum perlumynstrum, sum ikki eru at finna í bókunum, vit hava, og sovorðið – endamálið skal vera at læra frá okkum við at vísa. Vit brúktu til dømis skíggja at vísa, tá tað fór at goysa í Íslandi, og vit hava eisini nyttu av Google Earth, og vit brúka eina app, tá vit eru túrar. Men nýtslan av skíggja er altíð stýrd av okkum vaksnu.

– Eitt annað gott dømi er, tá løgtingsvalið var, og fólk skuldu á val. Men tá brúktu vit eisini høvið at greiða børnunum frá, hvat eitt val er. Tey fingu nakrar teknifilmar at velja ímillum, og so skuldu tey aftur um eitt forhang at atkvøða akkurát sum á einum vali, og síðan bleiv talt upp. Tey vóru akkurát líka spent upp á ta uppteljingina, sum vit vaksnu vóru um úrslitið av tí ordiliga valinum.

– Kanska kundu teknifilmar verið brúktir oftari, serliga tá vit eru



undirmannað, eg veit ikki, men tað hava vit ikki gjørt. Vit hava ikki viljað tað, og tað ger helst onki, um dagstovnurin í mest møguligan mun er uttan skíggjar. Vit uppliva eisini, at tey heldur ikki tíma at sita og hyggja í ein skíggja serliga leingi – tey vilja sleppa at spæla, sigur Elsa.

## Seta fólk eftir áhuga

Á Miðstovninum er tað ikki bara hjá børnunum, at tað er hugurin, sum stýrir. Tað er tað eisini hjá starvsfólkunum, í tann mun, tað yvirhøvur ber til, og tað er eisini í samsvar við Reggio Emilia-hugsjónina.

– Miðstovnurin hevur altíð miðað eftir at seta námsfrøðingar eftir teirra áhuga, tí tá fært tú eisini mest møguligt burtur úr tí einstaka námsfrøðinginum, sigur Elsa.

– Eg kann siga fyri mítt egna viðkomandi, at eg hoyri bestemt ikki til tað kreativa slagið, og um eg bleiv blakað inn á eitt kreativt verkstað at arbeiða sum námsfrøðingur, so hevði eg steindoyð. Eg kann gott perla og gera modeller-voks, men eg havi ikki nakran serligan áhuga í litsamanseting, ella um tað skal vera hetta ella hitt slagið av voksi ella leiri. Tað hevur ikki mín námsfrøðiliga áhuga.

Yvonna Hjaltalin arbeiðir í vøggustovuni, har hon hevurt ábyrgdina av Spíranum. - Tað kann vera øgiliga ógvusligt hjá einum pinkalítlum barni at koma inn í eina opna funksjón, tá tað eisini skal brúka orku upp á at fella til í einum nýggjum umhvørvi. Tí hava vit Spíran til tey minstu og tey nýggju, greiðir hon frá



– Men snýr tað seg hinvegin um rørslu og ítrótt og at skula út í lendið við børnunum og fáast við sansastimbran av ymiskum slag úti í náttúruni, so eri eg klár, sigur hon.

## Práta um uppsøgnir

Tó at tey flestu, sum søkja starv á Miðstovninum, hava hoyrt um námsfrøðiliga háttalagið har, so eru tað ikki allir umsøkjararnir, sum hava sett seg inn í tað – og víttfevnda frælsið hjá børnunum til sjálv at velja er heldur ikki so lokkandi hjá øllum.

– Tá vit hava setanarsamrøður, so plagi eg at spyrja, um tey hava lisið um stovnin og arbeiðsháttin á heimasíðuni, og tað eru tað ikki øll, sum hava. So greiði eg frá tí, at vit leggja dent á tað fría, at børnini sjálv sleppa at velja.

– Vit eru øll ymisk, og eisini við hesum er tað so, at tað riggar ikki til øll. Onkur kanska leypir frá beinanvegin, men onkur hevur hug at royna og finnur so út av, at hetta var ikki akkurát tað. Tey hava kanska ilt við at innrætta seg eftir, at alt er so frítt, og at tað snýr seg um at blanda seg sum minst í tað, sum børnini sjálv hava hug til.

– Men vit hava ikki bara setanarsamrøður. Eg royni altíð at fáa eitt prát við fólk, sum hava sagt upp, tí eg vil fegin hoyra grundgevingina. Onkur vil kanska hava eina meira skipaða arbeiðsgongd ella okkurt, men í hvussu er vil eg hava at vita orsøkina, so vit møguliga kunnu broyta okkurt ella taka hond um tað, sum kanska styggir og ikki er tilætlað, greiðir Elsa frá.

## Praktiskir fyrimunir

At starvsfólkini hoyra til øki heldur enn siðbundnar barnagarðsstovur gevur eisini nakrar praktiskar fyrimunir, greiðir stovnsleiðarin frá.

– Vit vita til dømis, at hon, sum hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av útilívinum, sum meginregla altíð er úti. Hon hevur serligan áhuga fyri kroppi, rørslu, heilsu og útilívi, og nú, tá tað er gróður, fer hon at velta epli á einum lítlum grønum bletti, vit hava fingið aftan fyri Realskúlan. Tað er so, hvat tað er, men tað praktiska fyri allan stovnin er, at vit vita, at onkur vaksin altíð er úti, um børn fara út. Tað er ein stórur tryggleiki í tí, sigur Elsa.

Yvonna Hjaltalin arbeiðir sum námsfrøðingur í vøggustovuni hjá Miðstovninum, og hon greiðir frá, at opni bygnaðurin eisini hevur tann praktiska fyrimunin, at tað ger tað lættari og smidligari hjá stovninum eitt nú at lofta støðum við sjúkufráfalli.

– Skipanin við verkstovum og funksjónsuppdeiling ger, at stovnurin verður meira fleksibul, tá tað mangla starvsfólk, tí vit kunnu bara lata børnini savna seg um færri funksjónir og kanska lata eina ella tvær

aftur tann dagin. Alt við máta, tí sjálvandi má reglan vera, at tað er nóg mikið av starvsfólki at hava funksjónirnar opnar, um hetta skal rigga ordiliga, sigur hon.

Vøggustovan er nevniliga eisini ein opin stovnur við ymiskum funksjónum, sum børnini frítt kunnu velja, eins og barnagarðurin er.

## Spírin til tey minstu

Tó er ein serlig skipan, Spírin, fyri tey minstu børnini og tey nýggju børnini, sum akkurát eru byrjað í vøggustovuni.

- Tað kann vera øgiliga ógvusligt hjá einum pinkalítlum barni at koma inn í eina opna funksjón, tá tað eisini skal brúka orku upp á at fella til í einum nýggjum umhvørvi. Tí hava vit Spíran til tey minstu og tey nýggju. Har fáa tey frið. Men tað er tó als ikki so, at vit koyra skott í, so ongin sleppur inn har. Tí Spírin er eisin ein funksjón, og tað kann vera, at okkurt av hinum børnunum hevur brúk fyri at fella til ró ella bara vera har, sum tað er stilt. So koma tey yvir og verða kanska har eina løtu.

- Ella tey, sum hoyra til Spíran, fegin vilja sleppa okkurt annað. Vit hava eitt verkstað í vøggustovuni, sum ikki er opið allan dagin, men onkra løtu, og so fara tey inn har eisini, tí tey síggja, at har er vaksið fólk, greiðir Yvonna, sum hevur ábyrgdina av Spíranum, frá.

## Farloyvi bleiv varandi

Yvonna tók sína námsfrøðiútbúgving í Odense miðskeiðis í 1980'unum og hevur starvast á fleiri dagstovnum í Tórshavnar Kommunu, men áðrenn hon kom á Miðstovnin, hevði hon starvast sum ráðgevi í Barna- og ungdómsdeildini hjá kommununi í nøkur ár.

– Eg tók farloyvi, tí eg vildi royna líka at fáa fingrarnar í ta praktisku námsfrøðina aftur. Men eg helt hetta vera so stuttligt og spennandi, at eg føldi tað sum, at eg var ikki liðug her, tá farloyvistíðin var av. So tað endaði við, at eg fór ongantíð aftur í ráðgevarastarvið, sigur hon.

Tað var tann serliga fría og opna námsfrøðin í Miðstovninum, sum Yvonnu dámdi, og sum gjørdi, at hon hevði hug at verða verandi, men hon leggur dent á, at tað ikki merkir, at onki annað kann brúkast.

– Eg havi jú eisini arbeitt á tradisjonellum dagstovnum, har børnini hoyrdu til stovur, og teir kunnu saktans eisini rigga fínt. Tað er bara heilt upp á hvør sín máta, og tú verður noydd at broyta hugburð, tá tú kemur inn í hetta slagið av námsfrøði. Í teimum tradisjonellu stovnunum hoyrir tú ofta til eina ávísa stovu, men her eiga øll starvsfólkini øll børnini. Tað haldi eg vera ein spennandi máta at arbeiða upp á, sigur Yvonna.



*Tað kann vera skjótt at brenna seg, tá límpistólin verður brúkt, men børnini verða ikki forðað, og tey læra skjótt at fáa virðing fyri heita tútinum*

# Súlan er góð

**Leiðarin og varaleiðarin í Miðstovninum teknaðu nýtt búmerki ti stovnin í sambandi við, at barnagarðurin loksins kundi flyta inn í Kongagøtu. Súlan hevur verið eydnudjórið hjá stovninum í nógv ár og er sjálvandi avmyndað í búmerkinum, og í síni røðu samanbar Elsa Henrysdóttir av Reyni, stovnsleiðari, henda háborna flytifuglin við børnini á stovninum, ið eins og flytifuglar koma og fara**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

"Súlan er góð", siga Mykines-fólk, at súlan skal ikki fara frá teimum. Og eisini í Miðstovninum í Havn er Pálsmessa 25. januar hátíðardagur. Tí tá kemur súlan, og háborni fuglurin er eydnudjórið hjá Miðstovninum.

Í sambandi við, at barnagarðurin hjá Miðstovninum 19. oktober í fjør loksins kundi flyta inn í Kongagøtu 12, har frítíðarskúlin hevði verið, var móttøka og lítið hátíðarhald, og tá bleiv eisini nýggja búmerkið hjá stovninum avdúkað.

Tað eru stovnsleiðarin Elsa Henrysdóttir av Reyni og varaleiðarin Elin N. W. Tausen, sum hava teknað nýggja búmerkið, og Føroya Prent setti tað upp. Súlan er sjálvandi í miðdeplinum í búmerkinum.

Stovnsleiðarin innleiddi sína røðu við at endurgeva Emil úr Lønnebergi:

"Hav altíð hjartað opið fyri dreymum, tí har tað eru dreymar, er vón, og so leingi tað er vón, er tað vert at liva fyri".

Og síðan Pippi Smokkulegg:

"Hetta havi eg ikki roynt fyrr, so tað man fara at ganga".

Restin av røðuni var soljóðandi:

"Hesi seinastu tvey árini hava verið long, og til tíðir hava bylgjurnar verið høgar,men vit hava altíð megnað at hildið vónini uppi og róð trygt í havn. Og í dag standa vit her. Orðini hjá Pippi standa okkum í Miðstovninum nær, tí vit hava tilvitað valt at síggja teir fyrimunir, ið eru, fram um teir vansar, ið kundu verið. Hetta er ikki bara galdandi fyri hølis- og/ella garðsviðurskifti, men eisini reint námsfrøðiliga.

Virðisgrundarlagið hjá Miðstovninum er:
*Eitt hvørt barn hevur rætt til eitt gott barnalív.*

Miðstovnurin er eitt stað, har vit øll koma, sum vit eru, og tað er í lagi. Vit skula øll vera her.

Grundarsteinurin fyri okkara virðum eru umsorgan, tryggleiki, trivn-




*Súlan er góð, og súlan er eydnudjórið hjá Miðstovninum. Leiðarin og varðaleiðarin hava teknað nýggja búmerkið, sum var avdúkað, tá barnagarðurin í fjør heyst slapp inn í bygningin í Kongagøtu*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

aður, virðing, nærleiki og álit. Eitt barnasýni, har alt tað, barnið hevur við sær í felagsskapin, hevur virði. Eitt menniskjasýni, har týdningurin av tí menning og læring, ið felagsskapurin hevur við sær, er høgt í metum.

At viðurkenna hvønn einkultan sum sjálvstøðug menniskju við rættindum fyri egnum handlingum.

Vit leggja dent á, at øll børn kenna seg sædd hvønn dag, við at vit viðurkenna tey við navni og eygnasambandi. Vit vaksnu hava felags ábyrgd fyri øllum børnunum, og vit hava eina relasjón til øll børnini.

Við nýggju umstøðunum síggja vit fyri okkum, at vit saman við børnum og foreldrum koma at gera Miðstovnin til fantastiskt stað, ein leikvøll har spæli við øllum tí lærdómi, tað hevur við sær, sleppur at mennast, har vinabond fyri lívið verða ment, og har barnið sleppur at vera barn.

Vit hava í dag eisini fingið eitt búmerkið. Ímyndin er ein súla við einum ringi rundanum. Eins og súlan er ein flytifuglur, eru børnini eisini “flytifuglar”. Hvørt ár kemur onkur aftrat, og onkur fer víðari, og summi koma aftur. Ringurin, ið fer rundan um súluna, er ímyndin av felagsskapi, tað vit eru saman um, at tað bindur okkum saman, og guli liturin er sólin, ein nýggj byrjan, vøkstur og menning.

Flest okkara kenna søguna um rekatræið, døglingin og súluna. Á Miðstovninum royna vit at leggja okkum eftir at síggja tað góða, fyrimunir fram um vansar, gaman í eru tað umstøður rundan um okkum, sum kundu verið betri, men tað er altíð okkurt gott,sum vit kunna byggja víðari uppá. Hvat riggar beint nú, og hvat kann bíða. Eisini hjá børnunum. Vit eru øll ymisk ,men øll hava vit okkurt at bjóða hvørjum øðrum,  vit eru øll eins og súlan – “góð “.

Takk fyri og takk til Tórshavnar Kommunu fyri givnu umstøðurnar.

Vóni at vit saman fara at fáa nógv góð ár í eygnahædd við børnunum, og at vit kunnu vera við til at menna og geva teimum ein góðan, tryggan og umsorganarfullan barndóm, ið tey kunnu minnast á við gleði og lærdómi.”

## Frá skrivstovuni:

# STARVSALDUR OG LØNARTJEKK

8. juni skipar Føroya Pedagogfelag fyri "lønartjekk"-degi í Vági.

Felagið hevur skipað fyri slíkum døgum í Klaksvík, í Vágum og í Havn fyrr í vár.

Liminir, sum koma inn á gólvið, hava sum oftast avbjóðingar við starvsaldrinum, og tykist tað, sum at akkurát hetta er torført hjá arbeiðsgevarum og limum at fáa rætt, tá ið man byrjar í nýggjum starvi.

Í flestu førum er talan um, at vunnin starvsaldur ikki er taldur við, tá ið limir okkara hava skift starv. Í longdini kann talan verða um nógvan pening, sum manglar í.

Ímynda tær, at tú fært 500 krónur ov lítið í løn um mánaðin í fleiri ár?

Ein onnur avbjóðing er hjá teimum, sum hava eitt avloysarastarv afturat tí fasta. Tá er tað starvsaldurin í høvðsstarvinum, sum beinleiðis ávirkar, hvat lønarstig tú lendir á, um tú ert avloysari hjá øðrum arbeiðsgevara. Tú ert við øðrum orðum altíð á sama lønarstigi, sama hvør arbeiðsgevarin er, bara starvið er fevnt av sama sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Aðrar avbjóðingar kunnu vera, at avloysarastarvið ikki er talt við í uppgerðini av starvsaldri – ella gloymt – og fólk halda, at tey bara eiga at fáa starvsaldur frá tí degi, tey hava eitt fast starv.

Vit skulu tí minna á, at tú vinnur starvsaldur, bara tú arbeiðir 15 tímar ella meira um vikuna, eisini um talan er um skiftandi arbeiðstíðir, sum avloysari ella í tíðaravmarkaðari setan. Tú eigur í mesta lagi at verða 24 mánaðir á hvørjum lønarstigi fram til endastigið.

Starvsaldur telur við frá øllum sáttmálaøkinum. Tað merkir, at um tú hevur havt starv í einum barnagarði og síðani fert at arbeiða hjá Almannaverkinum ella øvugt, so eigur starvsaldurin at fylgja við.

Sáttmálin ásetir, at tú eigur at fáa eitt starvsaldurskort frá arbeiðsgevaranum, tá tú gevst í starvinum. Hetta verður tó í alt ov lítlan mun praktiserað. Men fyri at lætta um hjá tær sjálvum og fyri at sleppa undan, at feilir koma í, er tað góður ein góður vani, at tú sjálvur tryggjar tær, at tú fært eitt slíkt starvsaldursprógv, tá tú gevst í starvi.

Eisini vilja vit mæla til, at tú goymir tíni setanarprógv, tí tað kann verða drúgt at finna fram til gamlar lønarseðlar, tá prógv skal fáast til vega fyri vunnan starvsaldur.

Vit vilja tí heita á limir okkara um at kanna síni viðurskifti og ansa eftir, at starvsaldurin er rættur.

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan hjá Føroya Pedagogfelag stongd í tíðarskeiðnum 17. juli – 6. august.

*Umsitingin*




*Maika Samuelsen og Annika Østerø umboðaðu Føroya Pedagogfelag í arbeiðsbólkinum, ið skrivaði tilmæli við støði í kanning av, hvussu kommunalu dagstovnarnir handfara § 10 "Tíð til annað arbeiði" í sáttmálanum. Ein niðurstøða av kanningini er, at sáttmálaásetingin er lítið og onki verd, halda tær*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Sáttmálasetta fyrireikingartíðin munar onki

**Bæði námsfrøðingar og hjálparfólk brúka væl meira tíð upp á fyrireiking, enn sáttmálin ásetir, men kortini kenna starvsfólkini seg hava alt ov lítla tíð og vánaligar umstøður til fyrireiking. Sáttmálin er ov vánaligur á økinum, halda námsfrøðiligu umboðini í tilmælandi arbeiðsbólki**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Námsrøðingar á kommunalu dagstovnunum brúka í miðal tríggjar tímar um vikuna til fyrireiking og hjálparfólk 1,8 tíma. Tað vísir kanning, sum tær tríggjar Hjørdis Gaard, Gitte Klein og Anna Sofía Veyhe í fjør heyst gjørdu fyri Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF.

Ein skjót niðurstøða kundi verið, at so stendur bara væl til, tí í sáttmála-

## Tey átta tilmælini

1. Mælt verður til, at partarnir taka undir við allýsingini hjá fylgibólkinum av hugtøkunum, fyrireiking og eftirmeting.

2. Mælt verður til, at starvsfólk hava fasta fyrireikingar- og eftirmetingartíð, og at dagstovnaleiðarin fyriskipar hesi viðurskifti.

3. Mælt verður til, at bæði leiðarar og starvsfólk javnan fáa skeið innan námsfrøðiliga økið, umframt førleikamenning til at brúka eftirmetingartilgongdir og -amboð.

4. Mælt verður til, at leiðslurnar hugsa um, nær á degnum barnatalið á stovninum er stórt, og at hava fyrireikingartíðina, tá trýstið ikki er so stórt. Eisini verður mælt til, at arbeiðsgevararnar og leiðslurnar serliga leggja dent á, hvussu betrast kann um umstøðurnar hjá starvsfólkum í vøggustovum og barnagørðum at hava fyrireiking og eftirmeting.

5. Mælt verður til, at starvsfólk verða sett at arbeiða fullan starvsbrøk ella so høgan sum møguligt.

6. Mælt verður til, at høli er til fyrireiking og eftirmeting á stovninum, og at lagt verður upp fyri hesum, tá ið stovnar verða bygdir út ella við nýbygging.

7. Mælt verður til, at leiðarin, í tann mun tað ber til, tryggjar, at uppgávur, sum ikki eru partar av námsfrøðiligum arbeiðinum, verða útintar av øðrum fakbólkum, so sum húsavørðum og reingerðarfólkum.

8. Mælt verður til, at leiðarin tryggjar, at tíð til fyrireiking og eftirmeting fevnir um øll børnini og ikki einans børn við serligum tørvi.

num millum Føroya Pedagogfelag øðrumegin og KAF og Fíggjarmálaráðið hinumegin er í § 10, sum ber yvirskriftina "Tíð til annað arbeiði", ásett, at tíð skal setast av til at fyrireika og eftirmeta tað námsfrøðiliga arbeiðið. Og tað stendur, at námsfrøðingar kunnu brúka ein tíma um vikuna til fyrireiking, meðan onki tal er sett á fyrireikingartíðina hjá hjálparfólkum.

### Ov lítið av tíð

Men sannleikin er, at tað stendur alt annað enn væl til, spyrt tú starvsfólkini – námsfrøðingar og hjálparfólk. Kanningin vísir nevniliga, at bara 22 prosent av námsfrøðingunum á kommunalu dagstovnunum og 15 prosent av hjálparfólkunum mettu seg í stóran mun hava neyðugu tíðina til fyrireiking. 51 prosent av námsfrøðingunum og 54 prosent av hjálparfólkunum mettu seg hinvegin

í sera lítlan mun hava neyðugu tíðina til fyrireiking.

Tølini fyri eftirmetingina eru uppaftur verri, men sáttmálin nevnir ongi tøl fyri, hvussu nógva tíð starvsfólkini skulu hava til eftirmeting – har stendur bert, at tíð skal setast av til endamálið.

Eftir at kanningin varð latin Føroya Pedaogfelag og KAF, hevur ein arbeiðsbólkur arbeitt við tilfarinum, og 23 mars kom hann við sínum áliti við átta ítøkiligum tilmælum.

Annika Østerø, stovnsleiðari og limur í nevndini í Føroya Pedagogfelag, og Maika Samuelsen, námsfrøðingur, hava umboðað Føroya Pedagogfelag í arbeiðsbólkinum, og tær eru samdar um, at rætta tulkingin av kanningini ikki er, at tað stendur væl tl, men heldur, at fyrireikingartíðin í sáttmálanum er at kalla virðisleys.

– Nú mugu vit taka tað fyrivarni, at kanningin vísir miðaltøl. Tí kann tað vera onkur stovnur, sum als onga fyrireikingartíð hevur, og aðrir kunnu liggja langt oman fyri miðal. Men tað áhugaverda er, at so stórur partur av starvsfólkunum er ónøgdur við umstøðurnar at hava fyrireiking, hóast tey fáa meira tíð til tað, enn sáttmálin sigur, sigur Maika Samuelsen.

§ 10 "Tíð til annað arbeiði" er eisini sera veikt orðað. Tí gaman í stendur, at tíð skal setast av til fyrireiking og eftirmeting, men tá tal verður sett á – og tað er bara fyri fyrireikingartíðina  hjá námsfrøðingunum – stendur kann og ikki skal.

## Selir kong

Tað er ikki av ongum, at Annika Østerø hevur havt sæti í arbeiðsbólkinum, tí fyrireikingartíðin er eitt av hennara stóru hjartamálum, og tó at Pedagogfelagið ikki enn er sloppið í gongd við sáttmálasamráðingarnar, so ætlar hon í hvussu er at leggja nógv fyri at fáa bøtt um fyrireikingartíðina.

– Tað kann eg gott siga, at eg eri til reiðar at selja kong fyri at fáa eina virðiliga fyrireikingartíð. Og talan skal sjálvandi verða um, at nýggir tímar koma inn til endamálið og ikki sum nú, har tímarnir bara verða tiknir frá stovuni – tað vil siga frá børnunum, sigur Annika Østerø.

Í tilmælunum frá arbeiðsbólkinum veður ábyrgdin fyri fyrireikingartíðini í stóran mun løgd á stovnsleiðslurnar, men tá talan er um sáttmálaáseting ivast tær báðar í, um tað ikki eisini er ein uppgáva fyri álitisfólkini at halda við, um veruligur møguleiki fyri fyrireiking eisini er til staðar, og at rapportera inn til fakfelagið um hetta.

– Eg kann bara ímynda mær, í hvussu so er, sum § 10 er orðað nú, at tað er lætt hjá einum stovnsleiðara bara at lata sum onki og siga, at eg geri tað, sum eg skal gera, tað gongur fínt, og vit hava tað gott her. Tá vildi eg hildið, at tað má vera álitisfólkið, sum skal traðka til, sigur Maika Samuelsen.



*Forkvinnan Krista Hvannastein slapp ikki til Havnar at leiða regluliga aðalfundin hjá Námsfrøðinga-ráðnum, sum var hildin undan felagsaðalfundinum á Hotel Føroyum 11. mars. Hon slapp ikki úr Sandoynni, tí Teistin hevði maskinbrek, men ráð vóru kortini fyri tí, hon beyð vælkomin og helst eina stutta røðu á stórskíggja*

*Mynd: Pavla Eliasen - Fotostudio*

# Námsfrøðingaráðið virkisført

## Á eykaaðalfundi í Námsfrøðingaráðnum bleiv Katrin Eysturdal nývald í ráðið, sum nú er fullmannað. Sigrun Ørvarodd og Símun Mellemgaard blivu vald sum tiltakslimir

INGOLF S. OLSEN – PRESS

27. apríl hevði Námsfrøðingaráðið eykaaðalfund á Fiskastykkinum í Sandavági, tí tað var ikki fullmannað. Okkurt um 50 námsfrøðingar møttu, og endamálið við fundinum bleiv væl og virðiliga rokkið, tí trý fók bjóðaðu seg fram til ráðið.

Úrslitið av valinum varð, at Katrin Eysturdal, sum arbeiðir á serøkinum, bleiv vald í ráðið, og Sigrun Ørvarodd og Símun Mellemgaard,


Jean Krista Hvannastein


Anja Haldansen

sum bæði arbeiða á dagstovnaøkinum, blivu vald sum ávikavist 1. og 2. Tiltakslimur.

Hinir ráðslimirnir eru Jean Krista Hvannastein, forkvinna, Anja Haldansen, Dagny Miðskarð og Unn Jarnskor Ellingsgaard.

Ymiskt annað enn nevndarval var eisini á skránni í Sandavági.

## Áhugabólkurin

Edda Hjartvarsdóttir, forkvinna í áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, kunnaði um áhugabólkin og teirra virksemi. Hon legði dent á týdningin av at hava tíðindafólk við


Katrin Eysturdal


Unn Jarnskor Ellingsgaard

til tiltøk, fyri at skriva greinar, sum varpa ljós á týdningin av námsfrøðini og námsfrøðiliga arbeiðnum.

Áhugabólkurin hevur verið á vitjan á dagstovnum kring landið, og tosa um týdningin av námsfrøði.

Limir í Føroya Pedagogfelag kunnu verða limir í áhugabólkinum. Tað kostar 100 krónur um árið at verða limur.

Allir limir kunnu stovna ein áhugabólk – um ein hevur serlig áhugamál, sum ein ynskir at varpa ljós á, og arbeiða víðari við. Til ber at søkja um stuðul frá felagnum til virksemið hjá áhugabólkum.

Bólkaarbeiði var eisin á skránni á ekaaðalfundinum. Undir yvirskriftini "Námsfrøðingur í dagsins samfelag" vórðu hesir kjakspurningar umrøddir:

- Hvørji krøv verða sett til námsfrøðingar
- Hvussu seta vit betur orð á fakligheitina
- Hvønn týdning hava námsfrøðingar í dagsins samfelag, í teimum ymisku arbeiðsøkjunum
- Hvussu eru vit stilla í mun til løn, arbeiðsumstøður, fyrireiking og annað.

Herborg Torkilsdóttir undirhelt við sangi á eykaaðalfundinum hjá Námsfrøðingaráðnum.



*Dagny Miðskarð*



*Sigrun Ørvarodd, 1. tiltakslimur*



*Símun Mellemgaard, 2. tiltakslimur*

# Eru tíni fakfelags-viðurskifti í rættlag



Tað hevur týdning at vit hava teir røttu upplýsingarnar um teg, soleiðis at vit fáa sett okkum í samband við teg, og at tú fært tíni limarættindi, atgongd til kunning, upplýsingar og røttu atkvøðugreiðslur hjá felagnum.

Limarættindi eru millum annað tryggingar, møguleiki at fáa hjálp og vegleiðing frá umsiting felagsins, um neyðugt løgfrøðiliga hjálp og gevur tær eisini atgongd til ein limaportal og limakort, sum aftur gevur atgongd til tilboð frá ymiskum handlum.

Um tú ikki ert skrásettur sum limur – far inn á heimasíðuna, og skráset teg har, bið arbeiðsgevaran flyta limagjald til Føroya Pedagogfelag og kanna tín lønarseðil og fylg við har, um limagjaldið er flutt.

Um tú ikki hevur fingið teldupost ella pedagogblaðið sendandi seinastu mánaðirnar, er vandi fyri at tú ert skeivt skrásettur, dottin úr limaskrásetingini ella at onkur feilur er.

Tú kann seta teg í samband við felagið fyri at vita, hví so er: pedagog@pedagogfelag.fo ella telefon 357576, mánadag til hósdag millum 09.00 og 15.00.



Nýggj tænasta frá LÍV

# Vel títt váðastøði

Øll skulu vit spara saman til okkara eftirløn, og nú kanst tú velja tað váðastøði, tú vilt hava.

**Vel eitt váðastøði, ið hóskar til tín.**

Títt váðastøði í dag

**miðal**
Miðað verður eftir
**35%** lánsbrøvum
**65%** partabrøv & alternativar íløgur

**varið**
Miðað verður eftir
**45%** lánsbrøvum
**55%** partabrøv & alternativar íløgur

**høgt**
Miðað verður eftir
**15%** lánsbrøvum
**85%** partabrøv & alternativar íløgur

**partabrøv**
**100%** partabrøv

## Hvat skal eg gera?

Set teg í samband við okkum, um tú vilt broyta til annað váðastøði, ella um vilt frætta meira um tínar møguleikar.

**Vit sita klár á tlf 31 11 11**

**Les meira á liv.fo**

liv.fo